# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

| Mál nr. :<br>22/00318 | Lóg:<br>Lóg um fjølmiðlaábyrgd | Avgerð tikin:<br>24. februar 2022 |
|---|---|---|

**Kæra um almannakunngering av navni á persóni í revsimáli**


**Samandráttur:**
**Kært er um, at Kringvarp Føroya í sambandi við umrøðu av rættarmáli, nevnir mann við navni, sum er dømdur 5 ára fongsulsrevsing í einum revsimáli. Persónurin, sum nevndur verið við navni, er barn hjá kæraranum. Kærarin vil vera við, at talan er um brot á leiðreglur um góðan fjølmiðlasið.**

**Fjølmiðlanevndin metir ikki, at kærarin hevur ein ítøkiligan rættarligan áhuga í málinum, og metir ikki, at tað annars eru onnur viðurskifti, sum kunnu grunda ein rættarligan áhuga í kærumálinum.**

**Fjølmiðlanevndin hevur tikið avgerð um at avvísa at viðgera klaguna vegna væntandi rættarligan áhuga áhuga í málinum.**

**Fjølmiðlanevndin viðmerkir, at hon metir tað vera sera óheppið, at Kringvarp Føroya ikki hevur nærri innanhýsis leiðreglur fyri á hvønn hátt revsimál verða umrødd, og at Kringvarp Føroya og aðrir miðlar í Føroyum, sum umrøða revsimál, eiga at hava leiðreglur fyri á hvønn hátt revsimál verða umrødd, og hvørji atlit skulu takast í sambandi við umrøðu av revsimálum, soleiðis at tryggjað verður, at revsimál ikki verða umrødd og borin fram á tilvildarligan hátt.**


**<u>Rættarreglur</u>:**

Løgtingslóg nr. 45 frá 16. mai 2006 um fjølmiðlaábyrgd, sum broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 30. apríl 2007.

Løgtingslóg nr. 61 frá 16. mai 2006 um kringvarp, sum broytt við løgtingslóg nr. 48 frá 26. mai 2010.

Leiðbeining nr. 8000 frá 14. mai 2008 um góðan fjølmiðlasið.

**<u>Avgerðin hjá Fjølmiðlanevndini:</u>**

Fjølmiðlanevndin hevur á fundi tann 24. februar 2022 umrøtt kæru tygara og eftirfylgjandi við skrivligari viðgerð tikið støðu til, hvørt tygum hava kærurætt og hvørt grundarlag er fyri nærri at viðgera kæru tygara.

Í hesum sambandi hevur tørvur verið á at fingið avgreitt, hvørt tygum hava kært vegna barn tygara, ella hvørt tygum hava kært egna vegna.

Í telduposti tann 3. mars 2022 og í samrøðu við skrivstovuna hjá Fjølmiðlanevndini sama dagin, hava tygum greitt frá, at tygum kæra mest sum avvarðandi og pápi viðkomandi.

# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

Fjølmiðlanevndin vísir á, at ásett er í § 43, stk. 2, nr. 2, í lóg um fjølmiðlaábyrgd, at formaðurin í Fjølmiðlanevndini kann vísa burtur kærur frá kærarum, sum ikki hava rættarligan áhuga í málinum. Ongar serligar viðmerkingar eru í lógaruppskotinum til hesa grein.

Fjølmiðlanevndin metir, at ein rættarligur áhugi sum útgangsstøði má vera tengdur at, um málið hevur ein rættarligan virknað fyri viðkomandi kærara.

Upplýst verður, at tygum eru pápi at persóninum, ið nevndur verður við navni. Tygum verða ikki sjálvur beinleiðis nevndur, avmyndaður ella á annan hátt umrøddur á skrift ella í talu í sambandi við umrøðu av revsimálinum, sum barn tygara verður upplýstur at vera partur av. Sambært upplýsingum í málinum er barn tygara yvir 18 ár og harvið myndugt.

Fjølmiðlanevndin metir ikki, at tygum hava ein ítøkiligan rættarligan áhuga í málinum og mett verður ikki, at tað annars er onnur viðurskifti sum kunnu grunda ein rættarligan áhuga í kærumálinum.

**Fjølmiðlanevndin hevur tikið avgerð um at avvísa at viðgera kæru tína vegna vantandi rættarligan áhuga í málinum.**

Hóast Fjølmiðlanevndin hevur tikið avgerð um vísa burtur omanfyri umrøddu kæru, loyvir Fjølmiðlanevndin sær at viðmerkja frágreiðing kringvarpsins í málinum og koma við nøkrum yvirskipaðum viðmerkingum viðvíkjandi væntandi leiðreglum í sambandi við umrøðu av revsimálum í fjølmiðlunum.

Í sambandi við viðgerðina av ítøkiliga málinum hevur Kringvarp Føroya greitt frá, at tað er upp til hvønn fjølmiðil sær at áseta nakrar reglur fyri, nær nøvn verða nevnd, tá talan er um nøvn, myndir og onnur persónseyðkenni í umrøðu av málum um ákæru- ella revsiverd viðurskifti, sum umrødd eru í pkt. 4.7 í Leiðbeining um góðan fjølmiðlasið. Tá er tað sambært Kringvarpi Føroya ein spurningur um, hvussu álvarsligt lógarbrotið er. Er talan um dóm undir eitt ár skulu tað serstakliga góðar grundir til at nevna navn og tað verður ikki gjørt. Kringvarp Føroya undirstrikar tó, at síðstnevnda ikki er ein regla, sum er skorin í stein, men nakað sum Kringvarp Føroya metir eftir í hvørjum einstøkum føri.

Skrivstovan hjá Fjølmiðlanevndini hevur í sambandi við ítøkiliga málið sent fyrispurning til Kringvarp Føroya um leiðreglur í sambandi við umrøðu av revsimálum. Í skrivi dagfest 1. februar 2022 til skrivstovuna hjá Fjølmiðlanevndini greiðir Kringvarp Føroya frá, at Kringvarp Føroya ikki hevur nakrar innanhýsis leiðreglur um mannagongdir í sambandi við viðgerð av rættarmálum og líknandi. Kringvarp Føroya vísir til Leiðbeining um góðan fjølmiðlasið frá 2008 og endurgevur fylgjandi brot úr Leiðbeiningini um góðan fjølmiðlasið:

“Tað áliggur øllum, ið starvast í føroyska fjølmiðlaheiminum at vita, hvat er góður fjølmiðlasiður og at halda hendan sið. Fjølmiðlafólk eiga at leggja seg eftir at starva eftir fremsta yrkiskunnleika.

Hesin fjølmiðlasiður er støðið undir teimum fyrisettu málunum, sum eru bæði at verja rættin hjá einstaklinginum og rættin hjá fjøldini at verða kunnað. Hesin siður er hornasteinurin, sum fjølmiðlafólk binda seg til at virða.

Hesin siður eigur at verða virdur ikki einans sambært orðing síni, men í samljóði við endamál sítt. Hann eigur ikki at verða lagdur út ella tulkaður strangliga fyri at kunna seta til viks aðalmálið at verja einstaklingin, men tó heldur ikki so víðfevnt, at tað skerjir rættin hjá fjølmiðlum óneyðuga til talu-, skrivi- og kunningarfrælsi ella forðar kunning, sum hevur almennan áhuga.”

# Fjølmiðlanevndin - avgerðir

Kringvarp Føroya vísir á, at sambært orðingini í leiðbeiningini skulu leiðreglurnar:

*"...ikki at verða lagdur út ella tulkaður strangliga fyri at kunna seta til viks aðalmálið at verja einstaklingin, men tó heldur ikki so víðfevnt, at tað skerjir rættin hjá fjølmiðlum óneyðuga til talu-, skrivi- og kunningarfrælsi ella forðar kunning, sum hevur almennan áhuga."*

Hetta leggur upp til tulking í fleiri førum, sum Kringvarpið eisini hevur gjørt í sambandi við dekning av rættarmálum, nær nøvn skulu nevnast og ikki. Sum nevnt í svarinum til nevndina í hesum føri, so hevur Kringvarp Føroya gjørt eina tulking, nær nøvn skulu nevnast."

Skrivstovan hjá Fjølmiðlanevndini hevur harumframt spurt Kringvarp Føroya, hvørt nakað kann sigast um avgerandi atlit handan metingini um, hvørji mál skulu umrøðast, hvørt persónar skulu nevnast við navni og hvør tekur endaligu avgerðina um hesi viðurskifti.

Kringvarp Føroya greiðir frá, at "*Bæði útvarpstíðindi og sjónvarpstíðindi hava redaktørar til hvørja sending, sum stinga út í kortið og leggja til rættis, eins og teir hava seinasta orðið, um ivamál taka seg upp. Er redaktørurin í iva, setir hann seg í samband við tíðindaleiðaran."*

Fjølmiðlanevndin metir, at revsimál, sum útgangsstøði eru av almennum áhuga.

Fjølmiðlanevndin metir tað tó vera sera óheppið, at Kringvarp Føroya ikki hevur nærri innanhýsis leiðreglur fyri á hvønn hátt revsimál verða umrødd.

Fjølmiðlanevndin vísir á, at við eini yvirskipaðari leiting og gjøgnumgongd av greinum á heimasíðuni hjá Kringvarpi Føroya sæst ikki ein greið ella yvirskipað linja vera yvir á hvønn hátt Kringvarp Føroya umrøður revsimál og nær t.d. Kringvap Føroya nevnir navn á dømda í sambandi við umrøðu av revsimálum, har dómur er fallin.

Fjølmiðlanevndin er av teirri áskoðan, at Kringvarp Føroya og aðrir miðlar í Føroyum, sum umrøða revsimál, eiga at hava leiðreglur fyri á hvønn hátt revsimál verða umrødd, og hvørji atlit skulu takast í sambandi við umrøðu av revsimálum, soleiðis at tryggjað verður, at revsimál ikki verða umrødd og borin fram á tilvildarligan hátt.